# Norröna aftur í sigling

**Umvælingarnar av Norrönu á skipasmiðjuni í Hamburg hava gingið eftir ætlan. Í gjár var skipið á royndartúri, og í morgin er nýggja Norröna aftur í vanligari sigling**



NORRØNA

Sjálvt um arbeiðið at umvæla nýggju Norrönu hevur verið meiri umfatandi enn fyrst hildið, heldur tíðarætlanin um at fáa skipið aftur í sigling leygardagin.

Óli Hammer stjóri upplýsir, at roknað var við, at tað skuldi skiftast 35 tons av stáli út, men nú skipið er liðugt umvælt, eru heili 65 tons av stáli útskift.

Áhugin fyri nýggju Norrönu er framvegis stórur, og páskatúrurin er onki undantak. Higartil hava umleið 1.100 fólk bílagt ferðaseðil, umframt 300 bilar.

Stjórin á Smyril Line upplýsir, at meðan nýggja Norröna hevur verið til umvælingar, hevur gingið væl at hildið tørn við gomlu Norrönu.

- Vit kunnu siga, at tað í óhappinum var heppið, at skaðin hendi hesa tíðina og ikki undir summarsiglingini. Tað hevði verið til óbótaligan skaða fyri felagið, sigur Óli Hammer.

Fyrsti túrur hjá nýggju Norrönu verður leygardagin klokkan 16 úr Hanstholm. Á veg til Føroya leggur Norröna inn í Bergen og Lerwick.



# Fjølbroytt kirkjukonsert í Fríðrikskirkjuni

KONSERT
*Tíðindaskriv*

Árliga vórkonsertin hjá kórinum í Fríðrikskirkjuni verður í dag, leygardagin kl 17. Skráin er fjørlbroytt: heilt frá kórverki av Francois Coupertin, eini rættuliga krevjandi motett av týska tónaskaldinum Hugo Distler fyri ikki at tala um ta so undurføgru russisku Ave Maria, skrivað av Sergei Rachmaninov.

Eisini verður høvi at hoyra eina hugtakandi Kyrie úr fronsku messuni: Messe Basse fyri kór og sopran-solo, skrivað av Gabriel Fauré, har Eyðbjørg Hansen er solistur – hetta umframt sálmar, merktir av teirri páskahøgtíð, ið nú fer at stunda til.

Í støðum syngur kirkjukórið a capella, aðrastaðni verður sangurin stuðlaður av fylgispæli, og høvi verður við konsertina eisini at hoyra kamarmusikk spældan á instrument sum floytu, violin, cello og cembalo.

Kórleiðari er Mikael Jóhan Heinesen.

# Karaoke og DJ-show á Sandi

UNDIRHALD
*Tíðindaskriv*

Leygarkvøldið tann 20. mars verður Karaoke og DJ-show í Virkinum á Sandi. Fyri nøkrum vikum síðani vóru teir sum skipa fyri hesum tiltakið har suðuri fyri fyrstu ferð við tiltakinum. Og eins og aðrastaðni kring landið, varð tað ein stór »succes«

Tað stendur ikki á, at fara upp á pallin at tralla eitt gott lag, og tað at fáa øll hini í salinum at syngja við er ei heldur nakar trupulleiki. So nú sleppa Sandingar aftur at royna seg sum »stjerne for en aften«.

Men annað undirhald er tó eisini á skránni, tí navnframi James Olsen fer nevniliga eisini upp á pallin fyri at syngja. Við hannsara altíð góða og skemtiliga humøri, er altíð lív í har sum hann er staddur, og helst verður ikki øðrvísi hesa ferð.

# Ung úr 11 londum á summarlegu

NORRØNT SAMSTARV
*Tíðindaskriv*

Aftur í ár eru føroyingar bodnir við á norðurlendsku summarleguna í Hillerød í Danmark.

Legan er fyri 11 til 14 ára gomul úr Danmark, Finnlandi, Grønlandi, Íslandi, Norra, Svøríki, Álandi, Estlandi, Lettlandi, Litava og Føroyum. Hon verður frá 28.juni til 4.juli.

Summarlegan er í náttúruvøkrum umhvørvi, har sum skipað verður fyri hópinum av uttandura og innandura ítrívum, spølum og ítrótti.

Útferð verður gjørd til Keypmannahavnar, eitt nú í Tivoli.

Prísurin er 1.500,00 kr. umframt ferðina til Hillerød og heim aftur.

Á heimasíðuni www.nordlejr.dk fæst meira at vita um summarleguna, sum er fyri 90 ung úr 11 londum.

Umsóknarfreistin er til 23. apríl. Umsóknarblað fæst frá Norrøna Felagnum í Føroyum, J.Paturssonargøtu 24 í Havn, tlf. 217999.





Et smukt syn? – så skulle du se udsigten fra broen!

**Den er uforlignelig. Ikke mindst, når du selv står ved roret i klart vejr, skibet skyder 23 knob, og du kan se 12 sømil ud i horisonten.**

Kan du samtidig se skønheden i at beherske enorme hestekræfter? Og kan du se en fremtidig udfordring i at få skibets besætning til at yde deres allerbedste – og ikke mindst – tage ansvar for både mennesker og store værdier? Så er du måske én blandt de 90 cadetter, vi søger til start på uddannelsen.

Som skibsofficer hos A.P. Møller – Mærsk A/S får du adgang til et spændende lederjob i et af verdens største og mest velanskrevne rederier og en karriere, der udfordrer både dine faglige og menneskelige evner ud over, hvad et 8-16 job kan tilbyde.

MÆRSK

Du får en attraktiv løn, lange sammenhængende ferieperioder og et bredt spektrum af færdigheder fra erhvervsøkonomi til røgdykning. Desuden bliver du del af et helt særligt fællesskab om bord på en sejlende arbejdsplads. Alt sammen med fokus på håndtering af detaljen – grundlaget for den pålidelighed, der tegner Rederiets profil.

Uddannelsen, som er den højeste lederuddannelse indenfor søfart, veksler mellem teori og praktisk sejlads, hvor du får henholdsvis S.U. og løn. Du vil allerede under praktikperioderne få en stor del af det ansvar og de udfordringer, der venter dig i en international karriere som skibsofficer.

Læs meget mere om uddannelsen og jobbet på maersk-skibsofficer.dk, hvor du samtidig kan bestille informationsmateriale og ansøgningsskema.

maersk-skibsofficer.dk








*Soleiðis kemur økið við Bursatanga og Tinganes at síggja út, um atløgubryggja verður gjørd til nýggja Smyril við síðuna av plássinum til Norrønu*

# Hvar skal Smyril liggja

**Í dag, leygardag, verður Smyril flotaður av sponsku skipasmiðjuni. Men avgerðin um atløguviðurskiftini liggur framvegis í Mentamálaráðnum, har landsstýrismaðurin hevur eitt greitt tilmæli frá Fornminnisnevndini um at friða økið kring Tinganes at halda seg til**

FRIÐING
*Jón Brian Hvidtfeldt*
*jonbrian@sosialurin.fo*

Ein samd Fornminnisnevnd heldur fast við kravið um at friða økið kring Tinganes.

Hetta er veruleikin, ið Jógvan á Lakjuni, landsstýrismaður í mentamálum, hevur at halda seg til, nú málið um atløguviðurskiftini hjá Smyrli í høvuðsstaðnum er endað á hansara borði.

Jógvan á Lakjuni hevur í vikuni fingið eitt upprit frá fyrisitingini hjá sær í Mentamálaráðnum.

Uppritið lýsir tey fornfrøðiligu atlitini í málinum, og tað eru hesi, ið landsstýrismaðurin skal halda seg til. Og hesi stava í høvuðsheitum frá ráðgevandi myndugleikanum á økinum, nevniliga Fornminnisnevndini.

Men Jógvan á Lakjuni vil ikki seta málið so fýrkantað upp. Hann vísir á, at her er talan um eitt stórt mál, sum hann í næstum fer at taka upp á landsstýrisfundi.

– Í síðsta enda er tað eg, sum skal taka avgerðina, men eg vil fegin tryggja mær undirtøku fyri tí, sum eg geri, sigur Jógvan á Lakjuni

Spurdur, hvørt hann ikki bara eigur at fylgja sakkunnleikanum á økinum, sigur Jógvan á Lakjuni, at nógv samfelagsatlit eru í málinum.

– Tí ætli eg mær at hoyra allar partar, sigur landsstýrismaðurin.

## Estetiskur skaði

Í sínum tilmæli, ið er grunda á ummæli frá Fornminnissavninum, vísir Fornminnisnevndin á, at umhvørvið við Tinganes longu er munandi skemt, nú Norrøna hevur fingið atløgupláss í innasta partinum at havnini.

Fornminnisnevndin vísir á, at skemdin er styrkt av høga terminalbygninginum, sum er settur upp við atløguplássið. Og nevndin metir, at bæði bygningur og skip, orsaka støddini, als ikki sampakka við tey estetisku og landlagsligu atlit, sum eiga at verða tikin at tí søguliga umhvørvi, sum er í hesum parti av Havnini. Nevndin er ónøgd við, at útsýnið millum Skansan og Tinganes, tvey av týdningarmestu fornminnum í Føroyum, verður forðað.

Og harumframt vil eitt atløgupláss til Smyril við síðuna av Norrønu endaliga forkoma teimum estetisku og landslagsligu atlitunum, sum tikin eiga at verða kring tað søguliga umhvørvið.

## Eingin skaði

Í heyst kom Tórshavnar Havn við eini frágreiðing, ið skuldi lýsa viðurskiftini, um ein atløgubryggja varð gjørd til Smyril við síðuna av atløgubryggjuni til Norrønu.

Í frágreiðingini verður staðfest, at sambært galdandi ferðaætlanum verða tað tveir dagar um vikuna, har Norrøna og Smyril koma at vera á Havnini í senn.

Frágreiðingin staðfestir, at tað er eingin varandi loysn at lata Smyril liggja á øðrum stað enn inni á Bursatanga, millum annað orsakað av herdu krøvunum frá IMO til skip og havnir. Tí er tað einasta rætta at gera nýtt atløgupláss til Smyril við síðuna av atløguplássinum til Norrønu.

Og niðurstøðan í hesi frágreiðing, sum millum annað byggir á eina frágreiðing frá norsku ráðgevingarfyritøkuni Statkraft Grøner, er, at arbeiðið kann gerast á tryggan hátt, soleiðis at fornminnini ikki taka skaða, og at umhvørvið í økinum ikki líður nakran skaða.

## Stórur skaði

Fornminnisnevndin sigur í sínum tilmæli til landsstýrismannin í mentamálum, at spreinging í samband við eina møguliga dýping av økinum við Tinganes, hevur vanda við sær, at eingin kann veita trygd fyri, at skaði ikki hendur, og at hendur skaði kann vera óbøtandi.

Harumframt metir Fornminnisnevndin ikki, at umstøðurnar at leggja so stór skip innast í havnini er álítandi, og vísir til óhappið hjá Norrønu herfyri. Nevndin sigur í sínum tilmæli, at ein samsvarandi vanlukka á Tinganesi kann væl hugsast at elva til óbøtaligan skaða á fornminnini har.

Fornminnisnevndin er av tí áskoðan, at ætlaðu havnaútbyggingarnar ikki virða tey mentanarsøguligu og friðingarverdu áhugamálini, ið knýtt eru at Tinganesi.

# Pláss skal vera fyri Smyrli í Havn

**– Tað má finnast ein loysn, so nýggi Smyril verður partur av havnalagnum í Havn. Tað sigur Jóannes Eidesgaard, løgmaður**

SAMFERÐSLA
*Jón Brian Hvidtfeldt*
*jonbrian@sosialurin.fo*



Alt landsstýrið gerst nú partur av málinum um atløguviðurskiftini hjá Smyrli í Havn.

Vinnumálaráðið hevur eina umbøn frá Tórshavnar Havn liggjandi um at gera eina nýtt atløgupláss til Smyril, so hann kann røkja farleiðina til Suðuroyar á besta hátt.

Og Mentamálaráðið hevur eitt greitt tilmæli frá Fornminnisnevndini, ið staðiliga mælir frá at gera eitt nýtt atløgupláss til Smyril, tí tað kann skaða fornminnini í Tinganesi.

## Smyril í Havn

Jóannes Eidesgaard, løgmaður, er avgjørdur í spurninginum um, at Smyril skal hava eitt atløgupláss í Havn. Talan verður ikki um at lata Smyril sigla aðrastaðni, slær løgmaður fast. Men nærri eini loysn vil hann kortini ikki koma.

Hann vísir á, at øll eru áhugað í at varðveita Tinganes.

– Men vit kunnu ikki liva við, at Smyril er heimleysur í Havn, og tí má ein loysn finnast, so skipið gerst partur av havnalagnum, sigur løgmaður.

Hann ætlar sær nú fyrst at fáa eina frágreiðing frá Bjarna Djurholm, landsstýrismanni í vinnumálum, og Jógvan á Lakjuni, landsstýrismanni í mentamálum, og eisini verður málið tikið upp á landsstýrisfundi í næstum.

# Varðveitið Degnshús



*Jan Christiansen, borgarstjóri í Havn, fekk hósdagin 3186 undirskriftir, har mælt verður til at varðveita Degnshús, frá Inga Mohr og Jóhan Mortensen, stigtakarum*

**3186 undirskriftir vórðu hósdagin handaðar Jan Christiansen, borgarstjóra í Havn**

UNDIRSKRIFTIR
*Jón Brian Hvidtfeldt*
*jonbrian@sosialurin.fo*

Seinnapartin hósdagin handaði Ingi Mohr, fyrrverandi býráðslimur í Havn, 3186 undirskriftir til Jan Christiansen, borgarstjóra.

Undirskriftirnar eru mótmæli móti ætlanum at taka niður gomlu Degnshús, ið standa við Tinghúsvegin í Havn, og í staðin byggja ein nýggjan bygning í fimm hæddum.

– Hetta er órtúligt. Listarnir lógu einans frammi fáar dagar, og kortini var undirtøkan so góð. Hetta eru greið boð frá borgarunum í Havn um, at tey vilja varðveita húsini, sigur Ingi Mohr.

Nakrir listar liggja framvegis í handlum í Havn, og hesir verða savnaðir saman mánadagin, og verða síðan latnir borgarstjóranum.

## Eingi lyfti

– Hóast vit ikki fingu tilsøgn um nakað frá borgarstjóranum, so havi eg vónir um, at úrslitið verður, at húsini verða varðveitt, sigur Ingi Mohr.

Hann vísir á, at býráðið á sinni samtykti at lata 200.000 krónur til at varðveita húsini.

Nú skal málið aftur í nevnd, og eisini er Fornminnisnevndin inni í málinum.

– Essensurin er, at vit mugu varðveita býarmyndina í Havn, sigur ein væl nøgdur stigtakari.